## Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
## Bygdarráðsfundur tann 24. oktober 2017 kl. 19.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Ingi Olsen, Eyðun Hansen, John Zachariassen, Laila Haldansen, Herit Magnussen og Durita á Heygum
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Áðrenn fundin greiddi Pauli T. Petersen, borgarstjóri, frá, at síðani skráin er løgd, er eitt nýtt mál innkomið: tilmæli frá Teknisku nevnd um brúksrætt til parkeringspláss á kommunalari ogn á Toftavegi. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málið verður sett á skrá. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málið verður sett á skrá sum mál nr. 40.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 36**
Tilmæli frá Havnarnevndini um umsókn frá Gunnari Skúvadal um loyvi til at gera grótkast frammanfyri bátar teirra.
J. nr. 08.02.06-1-17

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi tann 16. oktober 2017 umsókn frá Gunnari Skúvadal um loyvi til at gera grótkast frammanfyri bátar teirra inni á Fjørð.

Mál nr. 11 frá seinasta fundi.
Nevndin mælti tá til at ganga umsóknini á møti.
Vestmanna Bygdarráð samtykti á fundi 26. september 2017 at heita á Havnarnevndina um at taka upp samráðingar við Gunnar Skúvadal um grótkastið.
Fundur varð við Gunnar Skúvadal 10. oktober. Frágreiðingin liggur í málinum.

Nevndin mælir til at gera avtalu við Gunnar Skúvadal um, at hann rindar fyri lessing, koyring og útlegging av dekkgrótinum.

**Viðv. 36**
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, skjeyt upp at samtykkja at heita á Teknisku deild um at gera projektið liðugt og at biðja um tilboð upp á arbeiðið. Tað skal eisini gerast eitt greitt kostnaðarbýti millum partarnar.

**Mál 37**
Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini um marknaumskipan av parti av matr. nr. 136a og parti av matr. nr. 135b.
J.nr. 01.04.00-2-17

Á fundi tann 21. august 2017 viðgjørdi Trivnaðar- og umhvørvisnevndin áheitan frá dagstovnaleiðsluni um at gera marknaumskipan av marti av matr. nr. 136a Jón Finn Klein er festari, og parti av matr. nr. 135b ogn hjá Vestmanna Kommunu, barnagarðurin, sí hjálagda kort.

Nevndin tók undir við áheitanini og heitti á Teknisku deild um at fara undir samráðingar við festaran um at gera marknaumskipan. Festarin Jón Finn Klein tekur undir við marknaumskipanini, og nú verður heitt á bygdarráðið um at viðmæla umsóknina, so umsóknin kann sendast til eigaran, Føroya Jarðargrunn.

**Viðv. 37**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 38**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um broytingar í byggisamyktini: víðkan av sethúsaøki á Fitjum og orðing av áseting fyri bilhús í byggisamtyktina.
J.nr. 82.00.00-G01-2-14

1. víðkan av sethúsaøki á Fitjum í samband við, at Vestmanna Kommuna hevur samtykt at selja Jan Johannesen part av matr. nr. 145a.
J. nr. 82.00.00-G01-2-14
Nevndin mælir til at broyta byggisamtyktina, sum skotið upp.

2. Orðing av áseting fyri bilhús í byggisamtyktina.
Nevndin samtykti at heita á teknisku deild um at kanna eftir hjá advokati og øðrum kommunum. Gera uppskot um orðing til komandi bygdarráðsfund.

**Viðv. 38**
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, skjeyt upp at beina pkt. 2 omanfyri um bilhús aftur í nevnd.
Atkvøtt var um uppskotið hjá Paula T. Petersen. Uppskotið var einmælt samtykt.
Atkvøtt var ikki um tilmælið frá nevndini.

Síðani var pkt. 1 viðgjørt.
Tilmælið var einmælt samtykt.

Ingi Olsen farin av fundinum.

**Mál 40**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um brúksrætt til parkeringspláss á kommunalari ogn á Toftavegi.
J.nr. 2001-394

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi tann 24. oktober 2017 málið um ferðsluna á vegastrekkinum á Toftavegi beint uttan fyri Vestmanna Skúla, herundir parkeringsplássið sum Óluva Djurhuus hevur brúksrætt til á kommunalari ogn innanfyri sethús teirra á matr. nr. 163b, Toftavegur 20.

Fyri at betra um trygdina hjá teimum, sum eru til gongu, mælir nevndin til at siga brúksrættin upp.

**Viðv. 40**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.55

Sign.:

Pauli T. Petersen Ingi Olsen Eyðun Hansen

John Zachariassen Laila Haldansen Herit Magnussen Durita á Heygum